

hoyrdist aftur. Her var einki av tí smakleysa atburðinum við at goyma hittini til eykaløg. Tá teir vórðu klappaðir út aftur at spæla eykaløg tyktust teir veruliga glaðir fyri tað. Teir komu út og spældu Children of the Grave eitt frálíkt lag, sum vanliga er á spæliskránnið, men sum hetta kvøldið var skift út við okkurt meira forkunnugt.



Áskoðarin: Ári Patursson, trøllaskald

*Eg haldi at Black Sabbath reistu pallin upp, man bleiv háláður líkst til helviti við teimum. Tónleikurin er so ræðuliga tungur, men Ozzy virkaði so positivur við sínum stóra smíli. Eg føldi meg fullkomnan, tá eg hoyrdi teir. Eg havi lurtað eftir Black Sabbath, síðan eg var 16 og kenni alt, sum teir spældu. Hatta var genialt. Tað vóru alíkavæl onkri løg, sum eg saknaði: t.d. Changes, Laguna Sunriset og Planet Caravan.*

# AUDIOSLAVE ER EIN SUPERBÓLKUR



Audioslave er Rage Against the Machine minus sangaran pluss Chris Cornell úr Soundgarden, og hetta er ein manning, sum higartil hevur skapt tvær fullkomiliga feitar rokkfløgur. Konsertin fríggjakvøldið á appilsingula pallinum á Roskilde festivalinum gjørdist fantastisk.

Bólkur rokkar so øðiliga væl, og løg sum "The worm", "Like a Stone, "Cochise", "Out of Exile" og "Doesn't remind me" vístu, at hetta er ein bólkur við nógvum at bjóða.

Men tíð var eisini til at fara aftur í fortíðina. Her vóru fleiri Soundgarden og Rage Against the Machine løg, men tað varð tann akkustiska útgávan av "Black Hole Sun", sum var største syngi við hittið. Øll 50.000 framman fyri appilsingula pallin sungu í kór, og tá Rage klassikarin "Killing in the name of" brakaði avstað í hølunum á honum, skrálaðu 50.000 í kór.

Hetta gjørdist ein frálík konsert við einum frálíkum bólki.



Áhoyrarin: Jan McIntosh, óheftur tónleikari

*Hatta var ein fín konsert, góður futtur í, gott undirhald. Haldi bara, at teir spældu ov tíðliga, har var alt ov heitt. Mær dámdi væl nýggju løgini, men tað var gott, at teir eisini spældu Rage Against the Machine og Soundgarden. Eg haldi, at Soundgarden løgini vóru ordiliga væl spæld, meðan Rage løgini vóru nøkurlunda. Eg haldi tó ikki, at bólkurin kann ella skal samanberast við Soundgarden ella Rage. Hetta er ein heilt annar bólkur, og tað er heilt hvør sítt. Lyklaorðini í summarmótanum eru: Stuttleiki og gleÐi*

# SPÆLIGLEÐI FYRI ALLAN PENINGIN

Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo



Green Day spældi eina ótrúliga góða konsert, sum telist millum mínar bestu konsertupplivingar nakrantíð. Hetta var ein bólkur, sum rokkaði so væl, at alt økið frammanfyri appilsingula pallin kókaði frá teimum fyrstu tónunum av American Idiot til teir endaðu við at spæla Boulevard of Broken Dreams og We are the Champions. Í endanum á Queen lagnum smildraði trummuleikarin eina av trummunum niður ígjøgnum eitt bekkarastativ. Boðskapurin var greiður: Her vera eingi eykaløg! Ein sjarmerandi gestus á einum festivali har flestu bólkar pínliga goymdu síni hitt til at spæla sum eykaløg. Síðsta lag varð spælt uttan trummir og var "Time of your life"

Eins og okkara egnu punkarar 200 var spæligleðin og stuttleikin ein stórur partur av framførsluni, men pláss var eisini til politiskar atfinningar. Green Day er nógv meira enn ein poppunk bólkur við eitt sindur av attitúdu. Her vóru sterkar meiningar ímóti høgravendum politikki og kríggi.

Spæligleðin hjá punkarunum skein ígjøgnum og smittaði øll. Økið framman fyri appilsingula pallin gjørdist ein stór veitsla við 50.000 gestunum. Hetta var eitt ordiligt rokk'n'roll show av teimum allar bestu. Teir spældu øll hittini bæði nýggj og gomul, og eina løtu tóku teir tríggjar ungar menn úr áskoðarunum upp at spæla undir, meðan sangarin sang. Her stóðu tríggir ungir menn, og spældu punk fyri 50.000 sálum, við Green Day sangaranum á pallinum. Ein fantastisk uppliving.

Tá Green Day fóru undir at spæla "We are the champions" hjá Queen, stóð ikki eitt tunguband stilt. Green Day vunnu við fleiri bátslongdum heimsmeistaraheitið í rokk'n'roll.



Áhoyrarin: Gunnvá Gaard, lesandi

*Green day vóru best. Upptraðkanin var ordiliga skeg. Teir spældu ótrúliga væl. Eg eigi eina fløgu við teimum, og eg kenni teir nokkso væl, men tað var stuttligt, at teir spældu so nógv ymisk løg eisini løg hjá øðrum. í eini jassuttari improvisering, og presenteraðu orkestri, og sangarin presenteraði seg sjálvan sum George W. Bush, Asshole.*

# SNOOP DOGGY DOG PROVOKERAÐI



Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo

Snoop Doggy Dog er ein av teimum mest provokerandi tónlistafólkunum í ídnaðinum, og tí var onkur provokatión í væntu. Áðrenn fyrsta lag varð av, hevði Snoopy spælt porno, vold og rúsevnisnýtslu á stórskíggjanum.

Konsertin hjá Snoop var sera væleydnað. Allur slættin frammanfyri appilsingula pallin hoppaði, dansaði og sang við, meðan Snoop rappaði um bitches, niggers og pot. Bæði bólkur og rapparin sjálvur vóru ótrúliga vælupplagdir. Bólkurin fevndi um nakrar backingrapparar, ein skratjara, gittarleikara, ljómborð og trummir.

Løgini vóru spæld við tí vanliga avslappaða og afturlenaða stílinum hjá Snoop, við nógvum yvirskoti. Snoop hevur verið í ídnaðinum leingi, og hevur skrivað ótrúliga nógv hitt, og hesi fullu í góða jørð hjá áhoyrarunum.

Millum løgini og í løgum vóru videoklipp spæld, og tá teir spældu eina duett við Justin Timberlake, var Justin við á stórskíggjanum, og tað var rættuliga lekkurt, tá hann ikki kundi vera við í egnum persóni.



Áhoyrarin: Gunn Reinert, skrivstovufólk

*Snoop var pissekul. Hann dugit væl at enterteyna. Men tað bleiv kiksað til síðst, tá hann rópti "say my name" umafturt og umaftur. Tað var, sum eitt hoyra eitt heppikór í amerikanskum fótbólti. Hetta er annars ikki tann tónleikurin, sum eg lurti eftir vanliga, men eg vænti, at mær hevði dámt tað enn betur, um eg lurtaði eftir sovorðnum.*